


*Tað gjørdist sera dramatiskt, tá ÍF vann á Mjølnir í Klaksvík í gjár. Næstsíðsti bólturin var ein serva, ið akkurát vann upp um netkantin, og síðani fekk Mjølnir dóm ímóti sær fyri feil í uppstillingini*

*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

# Dramatiskur endi

**MANSFLOGBÓLTUR** Ein netserva og ein uppstillingsfeilur avgjørdu fjórða og avgerandi settið, tá menninir hjá ÍF í Klaksvík vunnu á Mjølnir

Hilmar Jan Hansen

Nógv stóð upp á spæl í mansdystinum í Klaksvík í gjár, tá Mjølnir tók ímóti ÍF. Fuglfirðingar hava verið rættiliga suverenir tað mesta av kappingina, og higartil hava teir bara tapt eina ferð, so teir eru trygt oddalið, við SÍ tvey stig aftan fyri seg.

Mjølnir var undan dystinum átta stig aftanfyri, so tað var altavgerandi fyri klaksvíkingar, at teir fingu gjørt ein vørr, so teir eisini kundu blanda seg upp í kappingina um at koma í FM-finalurnar til várs.

ÍF legði bragdliga fyri og vann sannførandi fyrsta sett, men teir í Mjølnir vóru raskir at svara aftur og vinna annað sett, áðrenn ÍF aftur var omaná í triðja setti. Nú var sostatt sera umráðandi hjá Mjølnirmonnunum at koma afturíaftur eina ferð aftrat og vinna fjórða sett, so ein fimmsettari kundi sleppa at avgera dystin.

Tað sá eisini gott út hjá Mjølnir, sum ímóti endanum var á odda 24-21, men hóast bara ein bóltur skuldi til aftrat, eydnaðist ÍF at stríða seg upp á 24-24. Nú skiftust liðini um at koma á odda og javna, og Badmintonhøllin í Klaksvík rættiliga kókaði, tí hvørki liðið vildi sleppa hinum.

Tá støðan var 29-29, servaði Bárður Jacobsen fyri ÍF. Hann legði fyri við at serva á netkantin, so bólturin akkurát koppaði yvirum og datt niður í gólvi Mjølnir-megin. Men tá so Bárður aftur skuldi serva, rakk dramatikkurin hæddina, tá dómararnir dømdu bóltin til ÍF, tí Mjølnir hevði gjørt feil í uppstillingini.

Hóast teir í Mjølnir mótmæltu dúgliga, hjálpti eingin góða mamma, og sostatt kundi ÍF á sera dramatiskan hátt taka settið og dystin. Sjálvandi sera keðiligt hjá klaksvíkingum, ið vóru so nær við at yvirliva, men soleiðis eru reglurnar. Tí er ÍF oddalið, nú Eik-ligan hjá monnum fer í jólafrí – og nú er Mjølnir 10 stig aftan fyri fuglfirðingar.

# Kappingin í jólafrí

**FLOGBÓLTUR** Eingin landskappingardystur í Eik-ligunum hjá kvinnum og monnum verður aftur fyrr enn eftir nýggjár

Hilmar Jan Hansen

Dystirnir um vikuskiftið vóru teir síðstu landskappingardystirnir í hesum árinum, og nú kunnu liðini halda jólafrí til eina viku inn í januar mánað, tá landskappingin í Eik-ligunum hjá kvinnum og monnum verður tikin uppaftur.

Kortini halda ikki øll frí enn, tí um vikuskiftið verður árliga Mjølnir-kappingin í Klaksvík, har øll kvinnuliðini uttan SÍ og øll mansliðini uttan ÍF eru við. Har stendur ikki smávegis upp á spæl, tí ein sigur í tí kappingini kann enda við einum plássi í steypafinaluni.

Orsøkin til, at oddaliðini hjá kvinnum og monnum ikki eru við, er at SÍ og ÍF longu hava tryggjað sær pláss í steypafinalunum. SÍ-kvinnurnar, tí tær vóru á odda í landskappingini eftir fyrsta triðingin og ÍF-menninir, tí teir vóru á odda eftir fyrstu tveir fimtapartarnar av landskappingini.

Bæði kvinnu- og mansliðini hjá Mjølnir hava góðan møguleika at koma í steypafinaluna, tí tey vunnu Fleyr-kappingina í oktober mánaði. Við sigri í síni egnu kapping, koma tey beinleiðis í steypafinaluna, men vinna onnur lið nú, skulu »hálvfinalur« spælast millum vinnararnar um síðstu atgongumerkini til steypafinalurnar.

## Flogbóltsúrslit:

### KVINNUR

**Ternan - SÍ** 0-3
(20-25, 21-25, 23-25)

**KÍF - TB** 1-3
(19-25, 19-25, 29-27, 18-25)

**Mjølnir - ÍF** 3-1
(22-25, 25-17, 25-20, 25-15)

### MENN

**TB - SÍ** 0-3
(24-26, 11-25, 14-25)

**Mjølnir - ÍF** 1-3
(14-25, 25-22, 17-25, 29-31)

### Eik-ligan *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 9 | 8 | 1 | 24 | 10 | 14 | 16 |
| 2 | Mjølnir | 9 | 7 | 2 | 24 | 8 | 16 | 14 |
| 3 | Fleyr | 9 | 7 | 2 | 23 | 11 | 12 | 14 |
| 4 | TB | 9 | 6 | 3 | 21 | 15 | 6 | 12 |
| 5 | ÍF | 9 | 4 | 5 | 15 | 17 | -2 | 8 |
| 6 | KÍF | 9 | 2 | 7 | 9 | 24 | -15 | 4 |
| 7 | Dráttur | 9 | 1 | 8 | 12 | 25 | -13 | 2 |
| 8 | Ternan | 9 | 1 | 8 | 7 | 25 | -18 | 2 |

### Eik-ligan *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 10 | 9 | 1 | 27 | 6 | 21 | 18 |
| 2 | SÍ | 10 | 8 | 2 | 26 | 7 | 19 | 16 |
| 3 | Mjølnir | 9 | 4 | 5 | 14 | 16 | -2 | 8 |
| 4 | Fleyr | 9 | 3 | 6 | 11 | 20 | -9 | 6 |
| 5 | TB | 10 | 0 | 10 | 1 | 30 | -29 | 0 |

# TB kløkkaði SÍ

**MANSFLOGBÓLTUR** Tað var um reppið, at TB tók sett frá SÍ leygardagin, men tá hvøkkurin var yvirvunnin, sat SÍ væl og virðiliga á restini av dystinum

Hilmar Jan Hansen

Mansliðið hjá TB hevur enn nógv eftir at læra, tí liðið er nýtt í bestu mansdeildini, samstundis sum tað telur ungar og óroyndar spælarar. Enn er einki stig komið á kontuna, og settmunurin 1-30 sigur eisini eitt sindur um, hvussu tung tak tað er, tá eitt nýtt lið skal byggjast upp millum tey bestu.

Men leygardagin var tað altso um reppið, at TB spældi einum av oddaliðunum eitt ordans puss. SÍ var á vitjan, og gestirnir máttu altso upp um 25, áðrenn fyrsta settið var komið til høldar.

Hóast SÍ kanska ikki byrjaði dystin við sterkastu uppstilling, skal einki takast frá teimum í TB, ið spældu fult upp ímóti sørvingum. Liðini fylgdust allan vegin uppeftir, og TB hevði enntá settbólt við støðuni 24-23. Men tá síðsta takið skuldi takast, royndist SÍ kortini sterkari og vann settið 26-24.

Í teimum báðum seinnu settunum var als eingin ivi, tí tá hevði SÍ fingið ávaringina og spældi veruliga upp til sítt besta. Í øðrum setti servaði Ólavur Jensen sørvingar framum 11-0, og so hugdu teir annars ikki aftur um seg, men vunnu trygt. Serliga høvdu teir í TB trupulleikar av Rajko Petrovic, ið ikki var inni í fyrsta setti, tí í hinum báðum settunum blokkaði hann dúgliga og vann annars eina rúgvu av bóltum.